# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# VEIK LEIÐSLA OG HÓTTUR FLOKKUR

Tað var ein løgin leikur, sum fór fram mikudagin, tá Fólkaflokkurin tók fyrsta stigið at leggja tvey aðalráð saman. Men tað skilst á øllum brøgdum, at hetta ikki var ein avgerð, sum er væl umhugsað - hvørki í Fólkaflokkinum ella í samgonguni sum heild.

Løgmaður fekk ikki boðini fyri enn kvøldið fyri, og Jóannes Eidesgaard fekk boðini *»næstan ein heilan tíma áðrenn tíðindafundin hjá Fólkaflokkinum«.*

At tíðindaredaktiónirnar í Føroyum sita við boðunum frá Fólkaflokkinum áðrenn samstarvsflokkarnir hjá Jørgen Niclasen og løgmanni hava ánilsi av nøkrum, tað ber boð um vantandi leiðsluevni hjá evsta leiðara í Tinganesi, og tað vísir eisini eina djúpt frustreraða samgongu, har flokkar royna at finna upp á okkurt stunt til tess at tekkjast veljarafjøldini.

Løgmaður roynir at kyrra við at siga, at hetta stigið hjá Fólkaflokkinum ikki er øðrvísi, enn tá til dømis Javnaðarflokkurin skifti landsstýrismann. Men her letst løgmaður at vera naivari, enn hann er. Sjálvandi er tað eitt samgongumál, at ein landsstýrismaður hjá einum samgonguflokki skal umsita tvey aðalráð. Og hvar er logikkurin, hví skal løgmaður gjalda Jørgen Niclasen 63.000 krónur í løn um mánaðin, tá hann slett ikki hevur brúk fyri honum? Um Jacob Vestergaard kann gera arbeiðið eins væl í úrtíð, so kundi løgmaður spart 2,2 milliónir krónur í løn, sum Jørgen Niclasen hevur kostað síðani september í 2007.

Í hesum máli hevur tann annars sambært veljarakanningunum so væl umtókti løgmaðurin víst seg sum ein veikan leiðara. Hevði løgmaður itið Atli Dam ella Anfinn Kallsberg, so hevði slíkt ikki hent. Eingin hevði torað at víst so lítla respekt fyri teimum, sum teir vísa Kaj Leo Johannesen. Tað er tí, at alt ber til, og einki fær avleiðingar. Hendan handfaringin vísir eina veika leiðslu og eina samgongu, sum hvørki hevur gongulag ella áralag.

Motivið hjá Fólkaflokkinum er sjálvandi okkurt heilt annað. Søgur ganga um, at Poul Michelsen er við at stovna ein borgarligan fullveldisflokk, hvørs grundstuðlar eru fólk, sum hava vent Fólkaflokkinum bakið, tí hann



er ov sambandskur, og tjóðveldisfólk, sum vilja á borgarliga bógvin. Og tað er ein reel hóttan hjá Fólkaflokkinum, og tí hevur flokkurin brúk fyri einum sterkum leiðara. Men at koyra formannin úr landsstýrinum í tingið fyri at bjarga hesum, tað hongur slett ikki saman.

Í veruleikanum er Fólkaflokkurin organisatoriskt í svárum trupulleikum – trupulleikum, sum eru nógv verri enn hjá nøkrum øðrum flokki. Umframt flýggjan av grundstuðlunum, so hava tveir høvuðspersónar eitt rættarmál hangandi yvir sær, og aðalstjóramálið hjá Jørgen Niclasen liggur hjá umboðskonuni. Kemur hon eisini har við eini óbehagiligari niðurstøðu, so hevur floksformaðurin tað frægari á tingi enn í landsstýri.

## » Hví gjalda 63.000 til mann, sum brúk ikki er fyri?

# Norðlýsið tjenar mest




Norðlýsið gjørdi eitt ordans hál síðsta fríggjdag, tá tey fingu 49.108,75 krónur úr kommunukassanum!

Vit á privatu miðlunum hava gramt okkum so illa seinastu tíðina, at fólk helst eru farin at troyttast. Grenja um minkandi inntøkugrundarlag og um hamrandi órættvísa kapping frá Kringvarpinum.

Øðrvísi er statt á Norðlýsinum í Klaksvík. At knotur eru í sølufólkunum har norðuri, tað mugu vit bara sanna, samstundis sum marknaðardeildirnar hjá miðstaðarpressuni rodna av skomm, tí í Norðlýsinum kostar ein lýsingarsíða 12.500 krónur! Tað vísa skjøl, sum Klaksvíkar kommuna hevur sent okkum.

Síðsta fríggjadag kom Norðlýsið í hvørt hús í landinum. Blaðið var á tremur við góðum tilfari um, hvussu gott tað er í Klaksvík, og hvussu óreinin øll í Havn eru, sum bara taka frá klaksvíkingum.

Og nógv eru í øðini um hetta blað, serliga javnaðarfólk, sum føla seg illa happað. Fleiri eru beinleiðis fornermað.

Men vit í miðlunum, vit eru flóv. Vit eru flóv av, at vit ikki klára at kappast við Norðlýsið um lýsingarnar. Vit eru flóv av, at tildømis Klaksvíkar kommuna heldur vil betala 12.500 krónur fyri síðu 29 í Norðlýsinum enn dumpingprís í Dimmalætting, Sosialinum ella í Kringvarpinum.

Gunvá við Keldu, borgmeistari, fekk sín boðskap út. Hon hevur úr kommunukassanum í Klaksvík goldið Norðlýsinum 49.108 krónur og 75 oyru! Og tað er bara fyri lýsingar á teimum fimm síðunum, ikki fyri innihaldið, tí tað er ikki lov.

So kemur brúkaraumboðsmaðurin eftir Norðlýsinum.

Segði nakar okursprísur? 12.500 krónur fyri síðu 29 í Norðlýsinum, tað er í øllum førum kuul.

Spurningurin er so bara, um tey á Norðlýsinum eru góð sølufólk, um borgarstjórin í Klaksvík er eitt hopleyst oyðsl, sum ikki dugir at umsita skattaborgarans pengar, ella um talan er um dulda reklamu, sum brúkaraumboðsmaðurin eigur at taka sær av...

*(Vit kunnu skoyta uppí her, at Heðin Mortensen hevur havt ein følara úti hjá okkum, men sig einki!)*



## » Nýtt atlas, trongi ella vitan til lærdóm

BJARNI DJURHOLM
KJAK Á SÍÐU 20



## » Pravda endurfødd í Klaksvík

JOHAN SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 21



*Victora Wild, sum Beinta Jakobsen kallar seg, strippaði fyri einum komandi brúðgómi í sendingini í gjárkvøldið*

# Hvat man Helena siga til naknu Victoriu?

Tað er mikið áhugavert, at sjónvarpið hjá Kringvarpinum brýtur mørk. Og tað gjørdi Kringvarpið so dyggiliga í gjárkvøldið, tá teir fylgdu føroyska stripparanum, Victoru Wild, í Keypmannahavn.

Hon vísti bæði buppur og tað, sum loyniligari er – og tað er ikki gerandiskostur í føroyskum sjónvarpi.

Men vit bíða í spenningi eftir, hvør ting**maður** (tí tað eru bara menn sum hugsa um slíkt) verður tann fyrsti at senda Helenu Dam á Neystabø ein grein 52 fyrispurning, um hon heldur tað verða rætt at senda eitt sjónvarpslið – fyri skattgjaldarans pening – niður til Danmarkar at taka myndir av eini spillnaknari føroyskari kvinnu og vísa tað í sjónvarpinum!

Kanska vit skuldu útskrivað eina gitikapping, tí onkur *verður* tann fyrsti...

Okkurt bendir á, at Kringvarpið í næstu sending fer at renna aftan á samkyndum føroyingi.

Man tað ikki eisini verða eitt mál, sum er so stórt, at tingMENN fara at reisa málið?

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*